Tórshavn, tann 22. apríl 2013
J.Nr.:32/ 201200013 / 50

# Frágreiðing

# frá

# Eftirlitsvitjanini í sambýlunum:

# á Traðarvegi
# og
# undir Fobbakletti
# í Sandavági

# tann 1. mars 2012

**Innihaldsyvirlit**

1. Inngangur ... 3
2. Sambýlini á Traðarvegi 34 og undir Fobbakletti 14 í Sandavági ... 4
2.1. Starvsfólk ... 5
2.1.1. Normering ... 5
2.1.2. Valdsnýtsla/harðskapur ímóti starvsfólki ... 6
2.1.3. Tilbúgvingarætlan ... 8
3. Viðurskifti hjá búfólkunum ... 10
3.1. Búfólk ... 10
3.2. Tilboð um at søkja um upptøku í sambýlum og viðgerð av umsóknum ... 10
4. Dagliga virksemið hjá búfólkunum ... 14
5. Heilsuviðurskifti ... 16
5.1. Umsiting av heilivági ... 16
5.1.1. Samstarv við Psykiatriska depilin ... 17
5.2. Rúsevni ... 19
5.3. Royking ... 19
6. Persónligar upplýsingar og samskifti ... 20
6.1. Varðveitsla av persónligum upplýsingum ... 20
6.1.1. Rætturin til privatar upplýsingar ... 21
6.2. Samskifti ... 22
7. Fíggjarviðurskifti ... 23
7.1. Generelt ... 23
7.2. Umsiting av pengum og ognum hjá búfólki ... 23
7.3. Útreiðslur til uppihald ... 23
8. Eftirlit ... 27
9. Rundtúrur ... 29
9.1. Generelt um húsini og íbúðina á Traðarvegi ... 29
9.2. Loftið ... 29
9.3. Miðhæddin ... 29
9.4. Kjallarin ... 29
9.5. Íbúðin á Traðarvegi 34 ... 30
9.6. Generelt um húsini undir Fobbakletti ... 30
10. Samrøður við búfólk ... 32

## 1. Inngangur

Sambært § 5 í umboðsmanslógini hevur umboðsmaðurin eftirlit við, at almenna umsitingin ikki ger mistøk ella vanrøkir sínar skyldur, og at umsitingin ikki fremur órætt ímóti einstaka borgaranum.

Sambært § 8, stk. 1 hava umsitingareindirnar skyldu til at geva umboðsmanninum tær upplýsingar og at leggja fram øll tey skjøl, sum hesin embætis vegna krevur at fáa fyrilagt. Harumframt hevur umboðsmaðurin sambært § 8, stk. 3 í lógini rætt til at vitja øll støð, ið verða kannað, og hann hevur fría atgongd til at gera kanningar í øllum neyðugum hølum.

Sum ein liður í virksemi sínum, gjørdi umboðsmaðurin av at fara á eina eftirlitsvitjan í sambýlunum á Traðarvegi 34 og undir Fobbakletti 14 í Sandavági. Orsøkin til, at hesi sambýlini vóru vald, var, at sambýlini hýsa einum bólki í samfelagnum, sum kann hava ringt við at koma til orðanna. Harumframt hava sambýlini serligan áhuga, av tí at persónar, ið millum annað hava sálarligar diagnosur, búgva í sambýlunum.

Eftirlitsvitjanin var í samráð við sambýlini og Nærverkið sett til tann 1. mars 2012. Frammanundan eftirlitsvitjanini var ein fyrireikandi fundur hildin við leiðaran í sambýlunum og leiðsluna í Nærverkinum. Fundurin varð hildin tann 17. februar 2012.

Eftirlitsvitjanin byrjaði við einum fundi við leiðslu og starvsfólk. Frá umboðsmanninum luttóku umboðsmaðurin og tvey starvsfólk.

Eftir fundin vísti leiðarin í sambýlunum umboðsmanninum runt í báðum húsunum. Aftan á døgurða hevði umboðsmaðurin samrøðu við eitt búfólk, sum hevði biðið um fund. At enda varð fundur hildin við leiðaran í sambýlunum og leiðaran fyri Stuðuls- og trivnartænastuna hjá Nærverkinum, har tikið var samanum dagin.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina hevur umboðsmaðurin fingið neyðug skjøl og upplýsingar frá sambýlunum á Traðavegi 34, undir Fobbakletti 14 og Nærverkinum.

## 2. Sambýlini á Traðarvegi 34 og undir Fobbakletti 14 í Sandavági

Í oktober 2002 var Løgtingsins umboðsmaður á eftirlitsvitjan á psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum. Í frágreiðingini, dagfest 27. mars 2003, átalar umboðsmaðurin fleiri viðurskifti, sum sálarsjúk og liðugt viðgjørdir sjúklingar á psykiatriska deplinum liva undir. Umframt at bygningarnir vóru í sera vánaligum standi, vísti umboðsmaðurin á tann stóra trupulleika, at 40-50 seingjarpláss av teimum 70, sum eru til taks á deplinum, verða nýtt til bústað hjá sjúklingum, sum ikki hava tørv á at vera innlagdir. Orsøkin til, at fólkini búðu á deplinum, var, at eingi onnur bústaðartilboð vóru til hesi fólkini.

Sosialpsykiatri og bústaðartrupulleikarnir hjá psykiatrisku sjúklingunum eru øki, sum landsstýrismaðurin í almannamálum hevur ábyrgdina av, men samstundis eru tað øki, sum eisini í stóran mun ávirka heilsuverkið. Á almannaøkinum vóru umleið 5 mió kr. settar av í 2003 til at keypa/byggja bústaðir til sálarliga veik fyri.

Landsstýrismaðurin í Almannamálum keypti í januar 2003 ognina undir Fobbakletti 14 í Sandavági, sum kundi hýsa 5 búfólkum, og í desember 2004 keypti landsstýrismaðurin (tá Almanna- og Heilsumál) ognina á Traðarvegi 34 í Sandavági, ið kundi hýsa 4 búfólkum.

Ognirnar vóru keyptar við tí endamáli at hýsa sálarsjúkum fólkum, sum vóru liðugt viðgjørdir sjúklingar á psykiatriska deplinum.

Í 2005 var íbúð til eitt fólk bygd. Íbúðin er knýtt at ognini á Traðarvegi 34, og stendur leys frá sethúsunum.

Í 2004 fluttu 5 búfólk inn í húsini undir Fobbakletti 14 og í 2005 fluttu 5 búfólk inn í húsini á Traðarvegi 34.

Stovnurin hoyrir bygnaðarliga til Nærverkið (nú Almannaverkið) og er skipaður undir eini deild í Nærverkinum, ið kallast Stuðuls- og trivnaðartænastan. Deildin veitir millum annað búpláss til persónar við serligum tørvi. Sambýlini eru ikki knýtt bygnaðarliga at psykiatriska deplinum á Landssjúkrahúsinum, men búfólkini fáa javnan viðgerð á deplinum.

Sambært § 32 í forsorgarlógini, hevur landsstýrismaðurin heimild til at stovna sambýli og at góðkenna, at stovnar verða umskipaðir til sambýli, umframt at áseta reglur um leiðslu og rakstur av hesum. Harumframt eru heimildir hjá landsstýrismanninum at áseta nærri reglur um ymisk viðurskifti viðvíkjandi eitt nú valdsnýtslu og umsiting av fíggjarviðurskiftum hjá búfólkum.

Í sambandi við eftirlitsvitjanina hevur umboðsmaðurin millum annað tikið útgangsstøði í niðanfyri nevndu reglum:

- Lovbekendtgørelsen nr. 100 fra 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 169 frá 23. desember 2011
- Anordning nr. 185 frá 13. mars 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien, sum broytt við anordning nr. 385 frá 11. apríl 2012

- Kunngerð nr. 1 frá 3. januar 2005 um valdsnýtslu á stovnum fyri fólk við víttfevnandi likamligum ella sálarligum brekum
- Kunngerð nr. 2 frá 3. januar 2005 um skipan av sambýlum
- Umfarsskriv nr. 1 frá 4. januar 2005 um valdsnýtslu á stovnum fyri fólk við víttfevnandi likamligum og sálarligum brekum
- Rundskriv frá 18. august 2008 um umsiting av pensjón hjá húsfólki á sambýlum
- Rundskriv frá 1. januar 2009 um skipan av sambýlum

Harumframt hevur umboðsmaðurin í sambandi við eftirlitsvitjanina í sambýlunum fingið upplýst, at leiðarin hevur tilevnað trý skriv, sum eru galdandi í sambýlunum. Hesi skriv eru ikki undirskrivað ella dagfest. Umboðsmaðurin hevur í sambandi við eftirlitsvitjanina fingið hesi skrivini handað:

- "Fíggjarlig viðurskiftir hjá búfólkunum"
- "Í sambandi við harðskap og valdsnýtslu"
- "Heilivágur"

### 2.1. Starvsfólk

Ein leiðari hevur ábyrgdina av sambýlunum á Traðarvegi og undir Fobbakletti. Eingin varaleiðari er á stovninum. Sambært leiðaranum fær eitt starvsfólk høvuðsábyrgd fyri hvørt sambýli, tá leiðarin er burturstaddur.

### 2.1.1. Normering

Í sambýlinum á Traðarvegi starvast 9 starvsfólk. 8 starvsfólk eru í føstum starvi, meðan 1 er í avloysarastarvi. 4 av teimum føstu starvsfólkunum arbeiða ¾ tíð, meðan 4 arbeiða fulla tíð.

Í sambýlinum undir Fobbakletti starvast 9 starvsfólk. 8 starvsfólk eru í føstum starvi, ímeðan 1 starvsfólk er í avloysarastarvi. 7 av teimum føstu starvsfólkunum arbeiða ¾ tíð, ímeðan 1 starvsfólk arbeiðir fulla tíð.

Eitt starvsfólk hevur nomið sær útbúgving sum supervisor. Hetta starvsfólkið arbeiðir undir Fobbakletti og er supervisor hjá starvsfólkum á Traðarvegi. Starvsfólkini undir Fobbakletti nýta uttanhýsis persón til supervisión. Hendan skipan verður nýtt, av tí at tað ikki verður mett skilagott at supervisera sínar egnar starvsfelagar.

Á báðum sambýlunum eru altíð tvey starvsfólk á vakt um dagin og tvey um kvøldið. Við sjúkrafráveru verður avloysari kallaður inn.

Ein vakin náttarvakt er fyri bæði sambýlini. Náttarvaktin gongur millum húsini tvær ferðir hvørja nátt. Annars ringja búfólkini eftir náttarvaktini, um okkurt er áfatt. Eingin alarmur er millum húsini. Búfólk, sum búgva í húsinum undir Fobbakletti vóru í apríl 2012 flutt til onnur hús í Sandavági, tí húsini ikki vóru mett egnað til bústað. Seinni er sambýlið flutt til Sørvágs, og síðani tá hevur náttarvaktin ikki kunna gingið ímillum húsini. Náttarvakt er nú eftir tørvi í Sørvági.

***Eg havi heitt á leiðaran** um at geva mær eina nærri kunning um, hvussu skipanin við einum starvsfólki á náttarvakt virkar, tá vaktin ikki longur kann ganga millum húsini.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> "Tað er føst náttarvakt á Traðarvegi í Sandavági, og hava øll búfólkini á Mýrutrøðni 12 í Sørvági møguleika at ringja til náttarvaktina. Telefonnummar er sligið upp í hvørjum kamari og í felagsrúminum. Starvsfólk eru til staðar frá kl. 08.00 til 24.00. Tað eru 2 starvsfólk á vakt um kvøldið, og meta tey, at búfólkini hava tørv á náttarvakt, so er avtalan tann, at annað starvsfólkið er har um náttina. Tørvurin á náttarvakt hevur verið sera lítil, og talan er um 10 náttarvaktir seinastu 3 mánaðarnar. Tað er sera sjáldan, at ringt verður til náttarvaktina á Traðarvegi."

### 2.1.2. Valdsnýtsla/harðskapur ímóti starvsfólki

Leiðslan í sambýlunum greiddi umboðsmanninum frá, at starvsfólkini í sambýlunum onkuntíð eru komin út fyri, at tað hevur verið neyðugt likamliga at halda búfólkum, av tí at tey gerast harðlig.

Leiðarin greiddi frá, at leiðarin hevði skrivað innanhýsis reglur um harðskap og valdsnýtslu, sum starvsfólkini á stovninum skulu fylgja. Umboðsmaðurin hevur fingið avrit av hesum reglum.

Sambært hesum reglum skulu starvsfólkini altíð gera sítt besta fyri at fyribyrgja, at harðskapur hendur í sambýlunum. Starvsfólk skulu ikki nýta harðskap ella valdsnýtslu í sínum arbeiði, tó undantikið um talan er um sjálvverju.

Búfólkini kunnu í støkum føri verða harðlig. Tað kann vera vent bæði móti materiellum lutum og fólki. Um eitt búfólk leypur á, er talan um at verja seg sjálvan. Fyri at verja seg sjálvan er fyrst at tryggja seg sjálvan við at sleppa burtur frá viðkomandi. Sambært reglunum er álagt starvsfólkum at fara út úr rúminum, og um onnur búfólk eru inni í rúminum, um at heita á tey um at gera tað sama. Um neyðugt skulu starvsfólkini fara heilt út úr húsunum og tryggja, at hini búfólkini eisini sleppa út.

Um so er, at onkur er í vanda, skal starvsfólkið ikki fara einsamalt inn í rúmið, men tryggja sær hjálp, áðrenn víðari stig verða tikin. Starvsfólkini skulu ringja 112.

Greitt varð frá einum tilburði, har eitt búfólk, sum at síggja til virkaði friðarligt, brádliga fór at gera ógvusliga um seg, og varð hesin tilburður serliga skelkandi fyri starvsfólkini. Stovnurin fekk eftirfylgjandi vitjan av einum arbeiðssálarfrøðingi, sum hjálpti starvsfólkunum at leggja tilburðin aftur um seg. Starvsfólkini vórðu gjørd varug við, at tað er umráðandi altíð at tryggja seg sjálvan fyrst, sjálvt um ein starvsfelagi er í neyð. Hesin tilburður varð ikki formliga fráboðaður Nærverkinum, men leiðarin hevði eftirfylgjandi gjøgnum telefon kunnað leiðaran á Trivnaðartænastuni á Nærverkinum um tilburðin.

Umboðsmaðurin spurdi um rýmingarvegir hjá starvsfólkum og búfólkum, um so var, at eitt búfólk gjørdist harðligt ella vísti ein hóttandi atburð. Á Traðarvegi eru tvær úthurðar í kjallaranum og tvær úthurðar í stovuhæddini, umframt ein altanhurð. Á loftinum ber til at fara út

ígjøgnum vindeyguni og niður á eitt lágt tak og haðani at leypa niður í túnið. Undir Fobbakletti eru ikki góðir rýmingarvegir.

Greitt varð frá, at tað ikki er loyvt stovninum at fiksera fólk. Upplýst varð, at tað ongantíð er komið fyri, at starvsfólk hava byrgt búfólk inni.

Stovnurin hevur oyðibløð um ”fráboðan um valdsnýtslu v.m.”, ið skulu fyllast út, tá ið valdsnýtsla verður framd yvirfyri búfólki. Hesi oyðibløð hava ongantíð verið nýtt. Tó verða summir tilburðir við harðskapi frá búfólki noteraðir í dagbókina hjá búfólkinum. Dagbøkurnar hjá búfólkum ligga á skrivstovuni á stovninum.

Einki oyðiblað er viðvíkjandi harðskapi yvirfyri starvsfólki á stovninum.

*Likamlig valdsnýtsla er ein álvarsom atgerð, sum er vard av § 71 í grundlógini og art. 3 í Europeiska Mannarættindasáttmálanum. Tí er tað neyðugt at skjalfesta slíkar atgerðir, soleiðis at tað verður staðfest, hvat hendi í tí einstaka førinum; at valdsnýtslan stóð mát við umstøðurnar, og at talan var um eina neyðstøðu. Hetta eisini soleiðis, at starvsfólkini eftirfylgjandi kunnu verja seg ímóti atfinningum og møguligum kærumálum. Av somu orsøk, eigur likamlig valdsnýtsla eisini at verða fráboðað Nærverkinum í hvørjum einstøkum føri.*

*Eftir góðum fyrisitingarsiði eigur harðskapur og hóttanir frá búfólki at verða noterað. Hetta eisini soleiðis at starvsfólkini eftirfylgjandi kunnu vísa til skjalfestu tilburðirnar, t.d. tá ið nýggj viðgerð skal setast í verk yvirfyri einum búfólki, heilivágur skal broytast, ella støða skal takast til, hvørt eitt ávíst búfólk kann verða verandi í sambýlinum vegna harðskap ella hóttanir. Notatini kunnu í hesum førum nýtast sum skjalfesting yvirfyri myndugleikum ella avvarðandi.*

*Er harðskapurin ella tilburðurin revsiverdur, sambært kap. 25 í revsilógini, eigur at verða meldað til løgregluna. Í førum, har harðskapurin uppstendur bráðfeingis, eigur løgreglan at verða boðsend.*

***Eg havi heitt á leiðaran í sambýlunum** um at fáa hesi viðurskifti í rættlag.*

*Sum høvuðsregla er ikki neyðugt at fráboða tilburðir viðvíkjandi harðskapi ímóti starvsfólki til Nærverkið, men er talan um, at vandi er fyri starvsfólkum, og at búfólkið er ov vandamikið til at verða verandi í sambýlinum, eigur frágreiðing um tilburðinum at vera skrivað, eins og tilburðurin eigur at verða fráboðaður.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Almannaverkið er samt við Umboðsmanninum, at valdsnýtsla er ein álvarsom atgerð, og tí er neyðugt at skjalfesta slíkar atgerðir, soleiðis at tað verður staðfest, hvat hendi í tí einstaka førinum, at valdsnýtslan stóð mát við umstøðurnar, og talan var um eina neyðstøðu. Slíkar støður skulu sjálvsagt noterast og skulu fráboðast Almannaverkinum, og í teim førum, atgerðin er revsiverd, skal meldast til løgregluna. Almannaverkið fer at seta í verk arbeiði við at gera leiðreglur fyri stovnarnar, hvussu mannagongdin skal verða, tá slíkar støður koma í.”

### 2.1.3. Tilbúgvingarætlan

Leiðarin greiddi frá, at sambýlini ikki hava nakra tilbúgvingarætlan viðvíkjandi harðskapi ímóti starvsfólki. Stovnurin hevur havt skeið í sjálvsverju.

Umboðsmaðurin hevur í sambandi við eitt annað mál, sum er "Frágreiðing frá eftirlitsvitjan í sambýlinum á Bóndaheygi 14, dagfest 15. juni 2007" og "Frágreiðing viðvíkjandi uppfylging av eftirlitsvitjan í sambýlinum á Bóndaheygi 14, dagfest 24. juni 2008", viðgjørt spurningin um tilbúgvingarætlan í sambandi við harðskap ímóti starvsfólki.

Sambært hoyringskrivi frá Nærverkinum, dagfest 6. juni 2007, varð boðað frá, at Nærverkið fór at arbeiða fram ímóti, at hvør einstakur stovnur í Trivnaðartænastuni hevur eina tilbúgvingarætlan í sambandi við harðskap ímóti starvsfólkum. Við skrivi, dagfest 24. apríl 2008, boðaði Nærverkið frá, at arbeiðið við at gera eina yvirskipaða tilbúgvingarætlan fyri øll øki innan Nærverkið var farið í gongd.

Nærverkið hevur í frágreiðing til umboðsmannin, dagfest 9. september 2009, greitt soleiðis frá:

> "...
> Arbeitt varð miðvíst við omanfyri nevndu ætlan *(tilbúgvingarætlan, mín viðm.),* har t.d. evnið um valdsnýtslu varð tikið upp á leiðarafundum, og ein temadagur skuldi eftir ætlan verða á heysti 2008. Í sambandi við ætlaða temadagin, varð fyrsta stigið tikið til samstarv við Psykiatriska Depilin ...
>
> Av ymiskum orsøkum bleiv ætlaði temadagurin av ongum, og datt ein stórur partur av arbeiðnum við tilbúgvingarætlanini hareftir niðurfyri.
>
> Ásannandi at hetta var sera óheppið, hevur Nærverkið tikið stig til at taka málið uppaftur og er nú aftur gongd í at fáa tilbúgvingarskipanina at virka eftir ætlan.
> ..."

*Eg havi síðani 2007 fingið kunning frá Nærverkinum um at seta tilbúgvingarætlan viðvíkjandi harðskapi ímóti starvsfólkum í verk fyri allar stovnar undir Nærverkinum. Tó kann eg staðfesta, at enn er eingin tilbúgvingarætlan sett í verk. Ásannandi, at trygdin hjá starvsfólki og búfólki kann koma í vanda, av tí at búfólk av einari ella aðrari orsøk fremja harðskap,* ***havi eg heitt á Almannaverkið*** *um at geva mær eina frágreiðing um, hví tilbúgvingarætlanin viðvíkjandi harðskapi ímóti starvsfólkum enn ikki er sett í verk.*

***Eg havi samstundis heitt á Almannaverkið*** *um at taka hesi viðurskifti til viðgerðar og tryggja, at tilbúgvingarætlan viðvíkjandi harðskapi ímóti starvsfólkum verður sett í verk.*

***Eg havi harumframt heitt á Almannaverkið*** *um at umhugsa at víðka tilbúgvingarætlanina til eisini at fevna um harðskap móti búfólkum.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> "Almannaverkið má ásanna, at enn er ikki nøkur fullfíggjað tilbúgvingarætlan snikkað til og sett í verk, hóast hetta hevur verið í kortinum. Almannaverkið hevur tí avgjørt at hava

tilbúgvingarætlanina sum innsatsøki, og vónandi verður ein fullfíggjað tilbúgvinarætlan, sum bæði fevnir um starvsfólk og búfólk, liðug innan rímiliga tíð.”

## 3. Viðurskifti hjá búfólkunum

### 3.1. Búfólk

Sambært heimasíðuni hjá Nærverkinum er talan um ein málbólk av borgarum við avmarkaðum sálarligum førleikum, sum hava ein serligan tørv í so stóran mun, at tey hava brúk fyri starvsfólki til at stuðla og hjálpa sær í dagligu tilveruni.

Í sambýlinum á Traðarvegi eru tilsamans fimm mannlig búfólk, millum 36 og 62 ár. Talan er um langtíðaruppihald. Tann eini maðurin býr í eini íbúð fyri seg sjálvan, beint við síðuna av sethúsinum.

Tá eftirlitið fór fram, vóru trý búfólk á stovninum undir Fobbakletti; tvær kvinnur og ein maður. Talan er um langtíðaruppihald. Orsøkin til, at bert trý fólk búgva í húsinum, er, at tvey búfólk fyri stuttum eru flutt til Suðuroyar í eitt sambýli har.

Á eftirlitsvitjanini upplýsti leiðarin, at tað ikki gevur trupulleikar, at tvær kvinnur búgva saman við einum manni undir Fobbakletti. Búfólkini eru millum 39 og 60 ár.

Tað framgongur av skjølunum í málinum, at tvær kvinnur hava søgt um at sleppa at búgva í sambýlinum. Tann eina umsóknin er dagfest 30. juni 2008, og hin er dagfest 7. september 2011. Við skrivi, dagfest 22. februar 2012 hevur Nærverkið boðað umboðsmanninum frá, at báðar umsóknirnar vóru gingnar á møti, og at tær høvdu fingið tilboð um at flyta inn í sambýlið undir Fobbakletti umleið 1. mars 2012. Tað framgongur av málinum, at leiðarin fyri sambýlið við skrivi, dagfest 15. februar 2012 hevur boðað umsøkjara frá, at vegna umbygging og ístandsetan av húsinum undir Fobbakletti, verður ikki klárt at flyta inn fyrr enn 1. apríl 2012.

***Eg havi heitt á leiðaran** um at kunna meg um, hvat víðari er hent hesum viðvíkjandi.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Almannaverkið staðfestir, at tær báðar kvinnurnar, sum hava søkt um at sleppa inn á sambýlinum, eru fluttar inn á Mýritrøðni 12 tann 1. juli 2012.”

Tveir kontaktpersónar eru knýttir at hvørjum búfólki á stovninum. Kontaktpersónarnir umboða búfólkini í øllum viðurskiftum. Kontaktpersónarnir eru øll starvsfólk á stovnunum.

Einki búfólk hevur serligan likamligan tørv, so sum koyristól og líknandi. Generelt kann sigast, at húsini ikki eru atkomilig við koyristóli.

### 3.2. Tilboð um at søkja um upptøku í sambýlum og viðgerð av umsóknum

Kunngerð nr. 2 frá 3. januar 2005 um skipan av sambýlum ásetir reglur fyri, hvussu upptøka av búfólkum skal skipast.

§ 7 í omanfyri nevndu kunngerð er soljóðandi:

> “**§ 7.** Í sambandi við upptøku í tey ymisku sambýlini verður sett ein upptøkunevnd við 3 limum. Limirnir í upptøkunevndini eru: Deildarleiðari frá Heimarøktini og Serforsorgini, ið varðar av likamligum brekaðum, leiðarin fyri viðkomandi sambýli og eitt umboð fyri Almannastovuna. Fyri hvønn av hesum verður ein varalimur valdur.
> Stk. 2. Tá talan er um upptøku av sálarliga sjúkum fólki, skal umboð frá psykiatriska økinum á Landssjúkrahúsinum eisini vera limur í nevndini. Deildarleiðarin frá Heimarøktini og Serforsorgini skal í hesum førum varða av sálarsjúkum.
> Stk. 3. Áðrenn upptøkunevndin tekur støðu, eiga búfólkini í viðkomandi sambýli ella avvarðandi teirra at verða hoyrd.”

Í rundskrivi frá Almannamálaráðnum, dagfest 1. januar 2009 um skipan av sambýlum er hoyringsrætturin nærri lýstur. Undir punktinum “Upptøkunevndin” er millum annað soljóðandi vegleiðing um hoyringsrættin:

> “Upptøkunevndin eigur, samb. § 7, stk. 3 í kunngerðini, at hoyra húsfólkið ella tey avvarðandi á viðkomandi sambýli, áðrenn upptøkunevndin tekur endaligu avgerð um upptøku av húsfólki. Hoyringsrætturin hjá húsfólkinum ella teim avvarðandi er tó avmarkaður í mun til ásetingar í § 27 í fyrisitingarlógini. Hetta merkir, at upptøkunevndin ikki kann útvega húsfólki/avvarðandi upplýsingar um ættarslag, trúgv og húðalit; um politisk, felagsskaplig kynslig revsiverd viðurskifti, eins og upplýsingar um heilsuviðurskifti/diagnosu, stórar almannatrupulleikar og misnýtslu av njótingarevnum í sambandi við upptøku av húsfólki.
>
> Upptøkunevndin kann tó fáa samtykki frá umsøkjaranum um, hvørjar upplýsingar um viðkomandi kunnu verða umfataðar av hoyringsrættinum hjá húsfólkum ella teim avvarðandi. Hetta skal gerast í eini skrivligari avtalu millum umsøkjara og upptøkunevnd.
>
> Verður samtykki ikki givið, t.v.s. ongin skrivlig avtala verður gjørd millum partarnar, fevnir hoyringsrætturin bert um objektivar upplýsingar so sum aldur og kyn.”

Tað framgongur ikki av málinum, hvussu Nærverkið kunnar fólk um ella vísir fólki á, hvussu tey kunnu søkja um upptøku í sambýlunum.

Á heimasíðuni hjá Nærverkinum sæst eitt yvirlit yvir, hvørji sambýli eru í Føroyum. Á hesum yvirliti framganga Sambýlið á Traðarvegi, Sandavágur og Sambýlið undir Fobbakletti, Sandavágur. Tað eru ikki fleiri upplýsingar enn navn og adressa hjá sambýlunum.

Tó sæst á heimasíðuni, undir yvirskriftini “Umsókn um stovnspláss”, at:

> “Tann, ið metir, at eitt fólk hevur tørv á at búgva í einum sambýli ella bústovni, eitt nú viðkomandi sjálvur, avvarðandi ella lækni, kann venda sær til Økisdeildina hjá Almannastovuni ella Psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum, har áheitanin verður viðgjørd.”

Eftir at Nærverkið og Almannastovan vórðu løgd saman (nú Almannaverkið) og ein nýggj heimasíða er almannakunngjørd tann 11. oktober 2012, kann eg staðfesta, at ongar upplýsingarar yvirhøvur eru um sambýlir, upptøkukrøv ella viðgerð av umsóknum á nýggju heimasíðuni hjá Almannaverkinum.

*Eg haldi, at kunningin, sum Nærverkið hevði á heimasíðu sínari um sambýlini, er sera avmarkað og mangulfull.* ***Somuleiðis haldi eg****, at tað er alt annað enn nøktandi, at tað nú ikki eru nakrir upplýsingar yvirhøvur um sambýlini á heimasíðuni hjá Almannaverkinum.*

***Eg havi heitt á Almannaverkið*** *um at leggja upplýsingar um sambýlini á heimasíðu sína og at umhugsa eina betri kunning um sambýlini, herundir at lýsa møguleikarnar hjá fólki, sum ætla sær at søkja um upptøku í sambýlum, og um teirra rættindi og treytir. Harumframt vil eg mæla til, at Almannaverkið umhugsar møguliga at leggja fleiri upplýsingar, herundir myndir av ognunum, út á heimasíðuna. Á henda hátt kunnu fólk, sum hava tørv á einum búplássi, ella avvarðandi hjá fólkum við serligum tørvi, gera sær eina veruliga mynd av, hvørji hesi sambýlini eru, og hvørji rættindir og treytir eru fyri at fáa eitt búplass.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Almannaverkið er samt við Umboðsmanninum í, at mest møguligar upplýsingar, bæði um sambýlini, treytir og rættindi, skulu vera tøk á heimasíðuni hjá Almannaverkinum. Almannaverkið vísir tó til, at á ”gomlu” heimasíðuni hjá Nærverkinum, og sum framvegis er tøk, eru hóast alt upplýsingar um sambýlir og stovnar í teim ymsu økjunum í Føroyum, hvar tey liggja, og hvør leiðarin er. Nýggja heimasíðan hjá Almannaverkinum er framvegis í menning, og nevndu viðurskifti verða við í tí menningini.”

Av skjølunum, sum umboðsmaðurin hevur móttikið frá Nærverkinum, framgongur, at umsóknir frá tveimum persónum, um at fáa búpláss í sambýlunum, hava verið til viðgerðar.

Eftir at hava gjøgnumgingið skjølini í upptøkumálinum og viðgerðina av umsóknunum, dugi eg ikki at síggja, at búfólkini ella avvarðandi teirra eru hoyrd, sambært § 7, stk. 3 í kunngerð nr. 2 frá 3. januar 2005. Hetta játtaði leiðarin eisini á fundinum, sum umboðsmaðurin hevði á stovninum.

Leiðarin greiddi umboðsmanninum frá, at búfólkini verða kunnað, tá avgerðin um upptøku av nýggjum búfólkum er tikin. Eisini upplýsti leiðarin, at stovnurin higartil ikki hevur fingið nakað mótmæli.

Leiðarin greiddi frá, at tað er leiðarin, sum metir um og tekur avgerð um, hvussu samansetingin av búfólkum skal verða. Eisini upplýsti leiðarin, at tað kann geva trupulleikar, um búfólkini sjálvi kunnu gera av, hvussu samansetingin av búfólki skal verða. Hetta tí, at búfólkini í nógvum førum kenna hvør annan frá Psykiatriska deplinum.

***Eg havi ongar viðmerkingar til****, at leiðarin ger sær metingar um, hvørji búfólk hóska best saman, men eg dugi ikki at síggja, at henda meting kann verða fullfíggjað uttan so, at búfólkini eru hoyrd.*

***Eg havi heitt á Almannaverkið*** *um at geva mær eina frágreiðing um, hví búfólk ella avvarðandi hjá teimum ikki verða hoyrd í sambandi við viðgerð av umsóknum um upptøku av nýggjum búfólkum.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Almannaverkið hevur ikki nakra frágreiðing um, hví búfólk og avvarðandi ikki eru hoyrd, men ásannar, at hoyring av viðkomandi pørtum er partur av góðum fyrisitingarsiði. Almannaverkið vil í framtíðini tryggja, at bæði møgulig búfólk og teirra avvarðandi verða hoyrd.”

***Eg havi somuleiðis heitt á landsstýriskvinnuna í almannamálum*** *um at taka hesi viðurskifti til viðgerðar og tryggja, at hoyringarreglurnar í sambandi við upptøku av nýggjum búfólkum verða fylgdar.*

Við skrivi, dagfest 7. januar 2013, hevur Almannamálaráðið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Almannamálaráðið fer í næstum at venda sær til Almannaverkið fyri at tryggja, at Almannaverkið framyvir virðir hesi rættindi, soleiðis at borgarin verður hoyrdur smb. galdandi reglum.”

## 4. Dagliga virksemið hjá búfólkunum

Leiðarin greiddi umboðsmanninum frá, at tað er stórur munur á búfólkunum nú í mun til, tá sambýlini lótu upp. Búfólkini hava øll sálarligar diagnosur. Talan er tí um langtíðaruppihald hjá búfólkunum. Hjá summum búfólkum er tað fyrstu ferð, at tey hava eitt veruligt heim sum vaksin, eftir at tey hava búð á stovni í Danmark ella á Psykiatriska deplinum á landssjúkrahúsinum.

Tá ið sambýlini lótu upp, varð skipað fyri hugnakvøldi, har grannarnir vóru bodnir við. Hetta heldur leiðarin hevur gjørt ein ávísan mun í sambandi við gott grannalag.

Sambýlini hava havt hugnakvøld fyri búfólk og avvarðandi. Eisini hevur stovnurin ætlanir um at hava fund við avvarðandi og búfólk eina ferð um árið. Leiðarin upplýsti á fundinum, at fleiri búfólk lítið ella einki samband hava við teirra avvarðandi.

Leiðarin hevur gjørt húsareglur fyri starvsfólk og búfólk, eins og virksemisætlan/røktarætlan er gjørd fyri hvørt búfólkið sær. Harumframt er gjørd ein vikuætlan fyri aktivitetir hjá búfólkum.

Leiðarin greiddi frá, at starvsfólkini skulu skapa tryggar karmar um búfólkini. Starvsfólkini skulu skriva og grundgeva, um punkt á vikuætlanini ikki verða hildin.

Eisini skal skrivast í dagbókina eftir hvørja vakt, hvussu dagurin hevur gingið.

Leiðarin upplýsti á fundinum, at á stovninum verður miljøterapi brúkt sum eitt amboð at styrkja búfólkini og til at menna sjálvsvirði og førleikar.

Umboðsmaðurin hevur fingið avrit av tveimum virksemisætlanum/røktarætlanum. Av teimum sæst, at starvsfólkini taka útgangstøði í tí einkulta búfólkinum. Virksemisætlanirnar eru av somu orsøk ymiskar, men sum heild kann sigast, at arbeitt verður við at staðfesta, hvørjar trupulleikar tað einstaka búfólki hevur, at seta tiltøk í verk fyri at skapa tryggar karmar og fáa sett orð á, hvørji amboð kunnu nýtast, fyri at trupulleikarnir gerast minni hjá búfólkunum.

Starvsfólkini gera regluliga eina eftirmeting av støðuni hjá einstaka búfólkinum. Eisini sæst á virksemisætlanini/røktarætlanini, at arbeitt verður við at menna sjálvsálitið hjá búfólkunum og menna tey bæði likamliga, sálarliga og sosialt. Dentur verður lagdur á bæði persónligt reinføri og reinføri á kømrunum og í íbúðini, eins og dentur verður lagdur á, at búfólkini eru likamliga aktiv.

Á eftirlitsvitjanini greiddi leiðarin umboðsmanninum frá virkseminum hjá búfólkunum í dag. Trý búfólk hava arbeiði. Eitt búfólk arbeiðir hjá kommununi og tvey búfólk arbeiða á Verkstaðinum í Sørvági.

Búfólkini halda síni egnu kømur rein og ruddilig. Tey, sum hava tørv á stuðul, fáa tann stuðulin, sum er neyðugur fyri at útinna uppgávuna. Búfólkini hjálpa eftir førimuni við reingerð á felagsøkjum, matgerð og at halda økið uttanfyri húsini. Hetta er ein liður í sosialpedagogiska arbeiðinum í sambýlunum. Hvørt búfólk hevur ein dag um vikuna, har klæði verða vaskað. Reingerð í roykirúminum gongur upp á skift.

Maturin verður gjørdur í felagskøki í hvør sínum húsi. Búfólk er við til matinnkeypini saman við starvsfólki. Dentur verður lagdur á, at búfólkini fáa sunnan og fjølbroyttan mat. Øll búfólkini, uttan eitt, luttaka í matgerðini. Búfólkini eta saman, tó so at tey hava møguleika at eta hvør sær. Eitt búfólk hevur egna íbúð og kann tí velja at eta í sínari íbúð. Eitt annað búfólk ynskir ikki at eta saman við øðrum og situr úti í gongini við eitt borð og etur.

Viðvíkjandi frítíðartilboðum, greiddi leiðarin frá, at onkur av búfólkunum telva, og fleiri eru virkin í einum tónleikabólki, sum tey sjálvi hava stovnað. Sambýlini leiga ítróttarhøllina í bygdini til fimleik og fótbólt eina ferð um vikuna. Sambýlini hava dupulta manning til arbeiðis, tá ið búfólkini eru í ítróttarhøllini. Hetta er fyri at stimbra búfólkini til fysisk virksemi. Tey svimja eisini í svimjihylinum í Sørvági. Øll búfólkini skulu hvønn dag út at ganga ein túr. Leiðarin greiddi frá, at allar hesar likamligu rørslurnar hava bøtt nógv um trivnaðin bæði hjá búfólki og hjá starvsfólki.

Greitt varð eisini frá, at búfólkini sjálvi seta dagsskránna fyri ferium, útferðum o.a. og gera sjálvi av, um tey vilja við í feriu. Nøkur búfólk vitja heima hjá familjuni í feriuni. Um búfólk ikki ynskir at halda feriu, eru starvsfólk eftir í sambýlunum saman við teimum.

Farið verður í summarferiu hvørt ár, og feriutilboðið skal helst hóska til øll búfólkini. Vanligt er at leiga hús onkrastaðni í Føroyum.

Starvsfólkini í sambýlunum fara við jøvnum millumbilum at ferðast við búfólkunum. Leiðarin upplýsti fyri umboðsmanninum, at ætlanin var at fara til Danmarkar í summarferiu í ár. Fýra búfólk og 4 starvsfólk fara avstað. Búfólkini gjalda fyri starvsfólkini.

Leiðarin greiddi frá, at summi búfólk hava familju, ið tey vitja, uttan at starvsfólk eru hjástødd. Tá ið avvarðandi koma at vitja búfólk á stovninum, hava tey møguleika at vera saman privat í íbúð ella kamari. Summi avvarðandi og gestir gista hjá búfólkum á stovninum. Gisting hjá búfólki verður gjørt sambært avtalu við leiðaran.

*Eg havi ikki førleika til at meta um námsfrøðiliga tilboðið í sambýlunum, men sum sæst av omanfyrinevndu virksemisætlanum/røktarætlanum, verður nógv arbeiði gjørt fyri at menna og stimbra búfólkini.*

*Sambært tí, sum leiðarin hevur greitt mær frá og teirri fatan, ið eg fekk, tá ið eg vitjaði sambýlini og tey búfólk, ið eg tosaði við, sær tað út til, at búfólkini hava eitt gott innihald í gerandisdegnum.*

*Starvsfólkini fara javnan at ferðast við búfólkunum. Tað er eyðsæð, at hetta økir um lívsgóðskuna hjá búfólkunum, og harumframt hevur tað týdning at hava okkurt at síggja fram til.*

*Tað sær eisini út til, at stovnurin arbeiðir fyri, at búfólkini skulu hava samband við familju og vinir. Búfólkini kunnu vitja og fáa vitjan av familju og vinum uttan hjáveru frá starvsfólki.*

**5. Heilsuviðurskifti**

**5.1. Umsiting av heilivági**

Leiðslan greiddi umboðsmanninum frá, at øll búfólkini fáa reseptheilivág.

Leiðarin greiddi frá, at starvsfólkini fylgja mannagongd um heilivág, sum leiðarin hevur tilevnað. Umboðsmaðurin hevur fingið avrit av hesi mannagongd. Mannagongdin er galdandi fyri bæði sambýlini.

Sambært hesi vegleiðing hava øll starvsfólk ábyrgdina av, at búfólkini fáa sín dagliga heilivág. Hvørt starvsfólk sær hevur ábyrgd av, at tann heilivágur, sum tann einstaki gevur, er rættur.

Heilivágseskjurnar verða goymdar í skápum, sum standa á skrivstovuni hjá leiðaranum/starvsfólkum. Heilivágsskápini eru altíð læst, og tað skal altíð vera eitt starvsfólk, sum hevur lykilin til heilivágskápið undir hond. Navnið á tí starvsfólki, sum hevur lykilin, verður skrivað í kalendaran fyri hvørja vakt. Leiðarin upplýsti, at stovnurin ikki hevði havt trupulleikar við innbroti ella stuldri av heilivági.

Eina ferð um vikuna (mánamorgun) verður heilivágur doseraður fyri hvørt búfólk sær. Henda dosering er fyri eina viku í senn. Tað eru bert faklærd starvsfólk, sum kunnu dosera heilivágin hjá búfólkunum, og hesi starvsfólk hava ábyrgdina av, at rættar doseringar verða givnar. Annað faklært starvsfólk skal kanna eftir, um rætt er doserað.

Bert faklærd starvsfólk kunnu bíleggja heilivág, og hava tey ábyrgdina av, at rætt er farið fram, og at heilivágur altíð er til staðar hjá tí einstaka búfólkinum.

Psykofarmika verða bíløgd í gjøgnum Psykiatriska depilin á Landssjúkrahúsinum. Bíleggingarnar verða sendar við telduposti. Um broytingar av heilivágsnøgd skulu fara fram, eitt nú um búfólk skulu trappast niður í heilivági, verður hetta gjørt í samráð við Psykiatriska depilin. Heilivágur verður bílagdur til 2–3 mánaðar í senn.

Allur annar heilivágur skal bíleggjast ígjøgnum kommunulækna.

Leiðarin kunnaði um, at í framtíðini fóru heilivágsrullur við dosering at verða pakkaðar á apotekinum.

Tað er ásett í innanhýsis mannagongdir, sum eru galdandi fyri starvsfólk, at sama starvsfólkið, sum bíleggur heilivág, eisini skal vátta fyri móttøku av heilivági, umframt at dagfesting, slag og mongd av heilivági skal noterast í eina serstaka bók. Um viðkomandi, sum hevur bílagt heilivágin, ikki er til staðar tann dagin, heilivágurin kemur, skal annað fakfólk vátta fyri móttøku og føra tað í bókina. Heilivágur skal ikki verða liggjandi í fleiri dagar, uttan at hann verður skrásettur í bókina.

Leiðarin greiddi frá, at ongar skrivligar mannagongdir eru um tann heilivágin, sum skal latast inn aftur til Apoteksverkið. Leiðarin greiddi frá, at heilivágur av og á verður taldur upp, og

restheilivágur verður samlaður í ein beriposa og leveraður aftur til Apoteksverkið. Eingin váttan er frá Apoteksverkinum um slag og nøgd av heilivági, sum verður tikin innaftur.

*Eftir mínari metan er tað ikki nøktandi, at øll starvsfólkini hava atgongd til heilivágsgoymsluna, og at tað ikki eru greiðar mannagongdir fyri heilivág, sum skal sendast aftur til Apoteksverkið.*

*Stovnurin hevur eina rættiliga stóra goymslu av heilivági, og leiðarin upplýsti, at tað kanska ikki var neyðugt at liggja inni við so stórari goymslu.*

***Eg havi mælt leiðaranum til, saman við Almannaverkinum**, at seta í verk eina skipan, sum kann tryggja, at tað ikki er neyðugt at hava stórar goymslur av heilivági liggjandi í sambýlunum.*

***Eg havi eisini heitt á leiðsluna, saman við Almannaverkinum**, um at skipa fyri, at restheilivágur á heilivágsgoymsluni verður ein partur av innaneftirlitinum.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Almannaverkið er samt við Umboðsmanninum í, at tað ikki er nøktandi, at øll starvsfólk hava atgongd til heilivágsgoymsluna, og at tað ikki eru greiðar mannagongdir fyri heilivág, sum skal sendast aftur til Apoteksverkið, samstundis sum tað er óneyðugt at liggja inni við ov stórari goymslu av heilivági. Almannaverkið ætlar í næstum at fara í gongd við at gera mannagongdir hesum viðvíkjandi.”

### 5.1.1. Samstarv við Psykiatriska depilin

Viðvíkjandi samstarvi við Psykiatriska depilin greiddi leiðarin og starvsfólk frá, at tey halda ikki, at samstarvið við Psykiatriska depilin virkar nóg væl.

Greitt varð frá, at leiðandi yvirlæknin á Psykiatriska deplinum er tann einasti psykiatarin, sum er knýttur at búfólkunum. Yvirlæknin kemur á vitjan í sambýlunum 2 til 3 ferðir um árið, og tá hevur hann samrøður við búfólkini. Hetta samstarv er ikki formaliserað, og vitjanirnar eru tí tilvildarligar, skilt á tann hátt, at tað ikki eru formaliseraðar vitjanarætlanir um, nær og hvussu ofta psykiatarin skal vitja búfólkini.

Leiðarin greiddi frá, at eitt búfólk, sum hevði hóttandi atburð, men ikki hevði tørv á bráðfeingis innlegging, skuldi eftir ætlan innleggjast á Psykiatriska depilin í november 2011. Hetta búfólkið varð ikki innlagt fyrr enn 29. februar 2012 ella nærum 3 mánaðar seinni enn ætlað.

Umboðsmaðurin fekk upplýst, at tá búfólk verða innløgd á psykiatriska depilin, er heilsustøðan ofta sera vánalig. Kontaktfólk hjá búfólkunum eru ofta at meta sum nærmastu avvarðandi, tí ofta hava búfólkini lítið ella einki sambandi við sína familju. Ofta eru kontaktfólkini tey einastu, sum vitja búfólkini, tá ið tey eru innløgd. Um kontaktfólkið hjá búfólkinum setir seg í sambandi við psykiatriska depilin fyri at fáa upplýsingar um viðkomandi, herundir hvussu heilsustøðan hjá búfólkinum er, kunnu starvsfólkini á Psykiatriska deplinum ikki geva upplýsingar grundað á, at starvsfólk á Psykiatriska deplinum hava tagnarskyldu.

Á sama hátt, sum tá ið búfólk eru innløgd, verða upplýsingar um heilsustøðuna hjá innlagda ikki lætnar kontaktfólki ella leiðara, tá ið búfólkið verður útskrivað aftur.

*Eftir mínari fatan er tað ikki nøktandi, at kontaktfólkini hjá búfólkunum, herundir eisini leiðarin í sambýlunum, ikki fáa upplýsingar um heilsustøðuna hjá teimum búfólkum, sum eru innløgd til viðgerð á Psykiatriska deplinum. Hetta er serliga sæð í mun til, at leiðarin og starvsfólkini hava brúk fyri upplýsingunum í sambandi við, at tey skulu leggja arbeiðið til rættis, gera metingar av, hvørji tilboð viðkomandi skal hava í dagligdegnum, eins og um neyðugt seta serlig trygdartiltøk í verk. Sama er galdandi, tá ið eitt búfólk flytir frá einum stovni inn í sambýlið at búgva.*

*Eftir mínum tykki er tað umráðandi, at kontaktfólkini hjá búfólki og herundir eisini starvsfólk á almennum stovnum verða kunnað um tagnarskyldureglurnar í fyrisitingarlógini og í serlógum, herundir hvat tagnarskyldan fevnur um, og nær og undir hvørjum umstøðum upplýsingar, eitt nú um heilsustøðuna hjá fólki, kunnu ella skulu víðarigevast til annan almennan myndugleika.*

***Eg havi mælt leiðsluni, saman við Almannaverkinum og heilsuverkinum til at umhugsa** at seta í verk kunningararbeiði um tagnarskyldu og víðarigeving av upplýsingum.*

***Eisini havi eg mælt til, at Almannaverkið og heilsuverkið** umhugsar at gera mannagongdir fyri, hvussu starvsfólk skulu fyrihalda seg í sambandi við tagnarskyldu og víðarigeving av upplýsingum.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Umboðsmaðurin metir, at tað ikki er nøktandi samskifti millum bústovnar og psykiatriska depilin, ísmb. við at fáa upplýsingar um heilsustøðuna hjá teimum búfólkum, sum eru innløgd til viðgerð á psykiatriska deplinum, og umhugsast eigur at seta í verk kunningararbeiði um tagnarskyldu og víðarigeving av upplýsingum. Almannaverkið metir, at tað er av avgerandi týdningi, at álagda tagnarskyldan verður hildin út í æsir, men hinvegin ikki umsitin á slíkan hátt, at tað er til ampa fyri búfólkini, sum hóast alt skulu hava so góðar og tryggar umstøður sum møguligt. Almannaverkið arbeiðir í løtuni við samstarvsavtalu við Landssjúkrahúsið um, hvussu samstarvið stovnanna millum skal skipast og fer í hesum sambandi at taka spurningin upp við Landssjúkrahúsið, um ein meira heppin mannagongd kann verða fylgd, har bæði tagnarskyldan verður hildin, men eisini støðan hjá tí einstaka er við í myndini og støðan viðgjørd útfrá tí, sum er til hansara/hennara besta, og annars kunningararbeiði í hesum sambandi. Útgangsstøði kann takast í samstarvsavtaluni við Landssjúkrahúsið og møguliga tvinnast saman við tí avtaluni.”

Í sambandi við eftirlitsvitjanina hevur umboðsmaðurin fingið avrit av tveimum heilsufakligum eftirlitskanningum. Tann fyrra er dagfest 27. november 2007, og tann seinna hevur onga dagfesting, men er móttikin í Nærverkinum august 2009. Nærverkið hevur upplýst, at ætlanin er, at heilsufakligt eftirlit skal verða minst triða hvørt ár.

*Eg eri av teirri fatan, at tað er av stórum týdningi fyri búfólkini, at heilsufakligt eftirlit fer fram regluliga í sambýlunum, og tí haldi eg tað ikki vera nøktandi, at einki heilsufakligt eftirlit hevur verið í sambýlunum síðan 2009.*

***Eg havi heitt á Almannaverkið** um at fáa hesi viðurskifti í rættlag.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Tað er ikki nøktandi, at onki heilsufakligt eftirlit hevur verið síðan 2009, og Almannaverkið fer at skipa fyri, at heilsufakligt eftirlit kemur í eina trygga, regluliga legu.”

### 5.2. Rúsevni

Leiðslan í sambýlunum greiddi umboðsmanninum frá, at stovnurin ongar trupulleikar hevur av rúsevnum.

Eingin rúsevnispolitikkur er fyri búfólkini, men starvsfólkini fylgja ”Rúsevnapolitikkinum á Serforsorgarøkinum”, sum Nærverkið hevur tilevnað. Umboðsmaðurin fekk avrit av hesum politikki.

### 5.3. Royking

Leiðarin í sambýlunum hevur greitt umboðsmanninum frá, at búfólkið, sum hevur egna íbúð, hevur loyvi at roykja inni í sín íbúð, men ikki á felagsøkjum.

Stovnurin hevur roykirúm við útsúgving og møguleika fyri útlufting. Annars er roykibann á øllum felagsøkjum.

## 6. Persónligar upplýsingar og samskifti

### 6.1. Varðveitsla av persónligum upplýsingum

Leiðarin greiddi umboðsmanninum frá, at eingin journalskipan er, hvørki manuel ella elektronisk.

Persónligu skjølini hjá búfólkunum verða goymd í ringbindum í einum stongdum skápi á skrivstovuni. Starvsfólk hava atgongd til skápið. Roknskapur viðvíkjandi felagsrakstri og tilhoyrandi skjølum verður goymdur í ringbindum á skrivstovuni. Sama er galdandi fyri heilivág. Annars er ikki skipað, hvørji skjøl verða goymd hvar.

Starvsfólkamál verða goymd í einum stongdum arkivskapi á skrivstovuni. Bert leiðarin hevur atgongd til skápið.

Á skrivstovuni er ein telda, ið starvsfólkini hava atgongd til. Búfólkini hava ikki atgongd til hesa teldu. Á hesi teldu verða upplýsingar um alt virksemið hjá einstaka búfólkinum goymdar. Starvsfólk nýta telduna til arbeiðsbrúk.

Leiðarin greiddi frá, at hvørt einstakt búfólk hevur eina dagbók, ið starvsfólkini skriva í hvønn dag um, hvussu dagurin hevur gingið hjá búfólkunum. Í somu dagbók verða eisini nakrir tilburðir viðvíkjandi harðskapi skrásettir. Dagbøkurnar liggja á eini hyll á skrivstovuni, har øll hava atgongd. Harumframt liggur eisini ein bók, ið starvsfólkini skriva ymisk boð upp í. Umboðsmaðurin hevur hugt ígjøgnum dagbøkurnar og starvsfólkabókina. Leiðarin á Nærverkinum greiddi frá, at dagbøkurnar skulu førast á telduni framyvir.

Leiðarin greiddi frá, at hurðin til skrivstovuna á Traðarvegi ikki var læst, tá ið starvsfólk vóru í húsinum, og at búfólkini høvdu atgongd til skrivstovuna, tá ið hurðin var ólæst.

*Tað er als ikki nøktandi, at eingin journalskipan er á stovninum. Sambært § 1, stk. 1 í løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um Føroya Landsskjalasavn, er ásett, at savnindi hjá almennum stovnum skulu goymast og varðveitast. Sambært § 7 í hesi lóg hevur stovnurin ábyrgdina fyri, at skjalasavnið verður bygt upp og forsvarliga varðveitt.*

*Sambært góðum fyrisitingarsiði eiga øll skjøl á stovninum at verða skrásett og talmerkt, og fysisku málini eiga at verða varðveitt á einum tryggum staði. Hetta serliga sæð í mun til, at viðkvæmar, privatar upplýsingar um búfólkini verða varðveittar á stovninum. Onnur óviðkomandi eiga ikki at fáa innlit í upplýsingarnar. Heldur ikki onnur búfólk á stovninum. Neyðugt er ikki við einari elektroniskari journalskipan, ein manuel skipan hevði nøktað tørvin.*

***Eg havi heitt á leiðsluna*** *um sum skjótast at fáa journalviðurskiftini í rættlag.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Almannaverkið er samt við Umboðsmanninum í, at tað als ikki er nøktandi, at ongin journalskipan er á stovninum. Við samanleggingini, sum nú hendir millum Nærverkið og Almannastovuna, er journalisering ein týðandi táttur, eisini á bústovnum, sambýlum v.m., og

> í hesum arbeiði verður umrøtt, um hesir stovnar og sambýlir skulu við í nýggju felags journalskipanini, ella onnur loysn skal finnast. Men hetta tekur tíð, so ein manuel skipan verður fyribils gjørd."

### 6.1.1. Rætturin til privatar upplýsingar

Eitt búfólk hevur rætt til at síggja privatar og fíggjarligar upplýsingar um seg sjálvan, undantikið í teimum førum, har umhugsnið fyri búfólkinum sjálvum avgjørt talar ímóti hesum, jb. § 4, stk. 2, síðsta punktum í innlitslógini.

Viðvíkjandi atgongd til upplýsingar hjá øðrum búfólkum, er m.a. ásett í § 12, stk. 1, at rætturin til skjalainnlit fevnir ikki um upplýsingar um privatu viðurskiftini hjá einstaklingum.

Búfólkini hava sostatt ikki rætt til at síggja upplýsingar viðvíkjandi øðrum búfólkum enn sær sjálvum.

Starvsfólkini hava í sínum starvi rætt til at síggja allar upplýsingar um búfólkini, ið tey hava fyri neyðini fyri at røkja sítt starv. Samstundis hava tey tagnarskyldu sambært § 26, stk. 1 í fyrisitingarlógini.

Við at varðveita privatar og viðkvæmar upplýsingar um øll búfólkini í dagbókum, ið búfólkini hava atgongd til, er vandi fyri, at starvsfólkini ótilvitað koma at bróta sína tagnarskyldu, jb. § 26, stk. 1, nr. 6 í fyrisitingarlógini. Hetta er eisini galdandi, sjálvt um tað ikki er sannlíkt, at nakar av búfólkunum veruliga hyggur at upplýsingunum.

***Eg havi mælt leiðsluni í sambýlunum** til at broyta mannagongd, soleiðis at búfólkini ikki hava møguleika fyri at síggja, hvørjar persónligar, fíggjarligar og viðkvæmar upplýsingar starvsfólkini føra inn í dagbøkur og ringbind hjá hinum búfólkunum. Dagbøkur v.m. við privatum og viðkvomum upplýsingum eiga at verða varðveittar í stongdum skápi.*

*Um dagbøkurnar skulu broytast frá at vera ein fysisk bók til elektroniska dagbók, har skráseting av upplýsingum verða teldutøkar, vil eg mæla Almannaverkinum til at gera hetta á einum tryggum grundarlagi, soleiðis at upplýsingarnar verða vardar ímóti, at óviðkomandi fáa atgongd, eins og at tryggjað verður, at upplýsingar ikki kunnu strikast ella broytast, uttan at tað klárt sæst aftur, hvat er broytt ella strikað, og hví rættingar eru gjørdar.*

***Eg havi heitt á leiðaran og Almannaverkið um** at tryggja, at persóns-upplýsingar verða handfarnir og goymdir á ein tryggan hátt, soleiðis at óviðkomandi ikki hava atgongd til hesar.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> "Umboðsmaðurin mælir til at broyta mannagongd, soleiðis at búfólkini ikki hava møguleika fyri at síggja, hvørjar persónligar, fíggjarligar og viðkvæmar upplýsingar starvsfólkini føra inn í dagbøkur og ringbind hjá hinum búfólkunum. Sambært leiðaranum verða mappurnar og dagbøkurnar hjá búfólkunum nú læstar inni í einum tryggum journalskápi á staðnum."

### 6.2. Samskifti

Leiðarin greiddi frá, at persónlig brøv og pakkar altíð verða latin búfólkinum, soleiðis at tey kunnu opna sjálvi.

Búfólkini hava atgongd til telefon uttan hjáveru av starvsfólki, eins og tey kunnu hava privatar fartelefonir, teldur og internethald.

## 7. Fíggjarviðurskifti

### 7.1. Generelt

Á Løgtingsins fíggjarlóg er ein rakstrarjáttan til Serforsorg. Lógargrundarlagið undir Serforsorgini er § 32 í forsorgarlógini. Serforsorgin fevnir um dagstovnar, sambýlir, bústovnar, umlættingarstovnar, verk- og virknishús. Nakrir av hesum eru landsstovnum, sum verða riknir beinleiðis undir Almannaverkinum, meðan aðrir eru skipaðir sum sjálvsognarstovnar.

Sambýlini á Traðarvegi og undir Fobbakletti eru landsstovnar, sum verða riknir beinleiðis undir Almannaverkinum.

### 7.2. Umsiting av pengum og ognum hjá búfólki

Leiðarin greiddi umboðsmanninum frá, at øll búfólkini fáa fyritíðarpensjón. Búfólkini eru fíggjarliga myndug og hava fult ræði yvir egna kontu í peningastovnunum. Hvørki leiðarin ella starvsfólk hava fulltrú til at umsita inntøkur ella útreiðslur hjá búfólkunum.

Upplýst varð, at onkur av búfólkunum hava pengakassa standandi í heilivágsskapinum fyri betur at kunna halda skil á kontantum peningi. Restin av peninginum hjá hesum búfólkunum verður verandi á teirra egnu kontu í peningastovni.

Leiðarin hevur gjørt innanhýsis reglur fyri, hvussu starvsfólk skulu fyrihalda seg til fíggjarligu viðurskiftini hjá búfólkunum.

Sambært hesum reglum skulu starvsfólk, í teimum førum, har starvsfólkini síggja, at eitt búfólk hevur trupult við at fáa peningin at røkka til, bjóða viðkomandi stuðul. Tað skulu verða kontaktfólkini hjá viðkomandi búfólki, sum skulu bjóða seg til at stuðla í tann mun, tørvur er á tí.

### 7.3. Útreiðslur til uppihald

Leiðarin greiddi frá, at búfólkini rinda 2.500 kr. í húsaleigu og 3.100 kr. til el, olju, mat og bensin um mánaðin. Hesin peningur verður koyrdur í ein felagskassa, sum leiðslan hevur heimild til at umsita. Um búfólkini hava serlig ynski, t.d. at keypa møblar ella annað til kamarið, vegleiðir kontaktpersónurin búfólkinum í keypinum. Síðani verður keypt fyri pening hjá búfólkinum.

Stovnurin hevur ein bil til felags nýtslu. Búfólkini rinda bensin til bilin gjøgnum felagsútreiðslurnar.

Leiðarin greiddi umboðsmanninum frá, at tá ið búfólkini fara í feriu við starvsfólkunum, rinda tey fyri sína egnu ferð og uppihald og fyri ferðina hjá starvsfólki. Stovnurin rindar løn til starvsfólkið, í meðan tey eru burtur, tvs. dagløn og møguligar viðbøtur. Búfólkini seta fram ynski um, hvar tey skulu fara at ferðast.

Leiðarin greiddi víðari frá, at fara búfólkini til fótbóltsdyst, konsert, út at eta ella annað, verður meting gjørd av, hvørt hetta er eitt námsfrøðiligt tiltak. Er ikki talan um eitt námsfrøðiligt tiltak,

rinda búfólkini fyri seg sjálvan og starvsfólk. Er talan um eitt námsfrøðiligt tiltak, rinda búfólkini bert fyri seg sjálvan, ímeðan stovnurin rindar fyri starvsfólkini.

Leiðarin greiddi frá, at hetta verður umsitið, soleiðis sum fyriskrivað í Rundskriv frá Almannamálaráðnum frá 1. januar 2009 um skipan av sambýlum.

Ein sjálvstøðugur roknskapur verður førdur fyri felagskassan og roknskapurin verður grannskoðaður av uttanhýsis grannskoðara.

Umboðsmaðurin hevur fingið avrit av reglugerðini, eins og umboðsmaðurin hevur fingið avrit av roknskapum fyri 2009 og 2010.

***Eg havi heitt á leiðaran um*** *at senda mær eitt avrit av roknskapinum fyri 2011, tá ið hann er grannskoðaður.*

Umboðsmaðurin hevur tann 5. desember 2012 fingið avrit av roknskapinum fyri 2011.

*Eftir mínari meting gevur hendan skipan við uttanhýsis grannskoðan eitt nøktandi fíggjarligt eftirlit, og eg havi tí ikki viðmerkingar hesum viðvíkjandi.*

*Sambært § 32, stk. 2, síðsta punktum í forsorgarlógini, skal landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um rakstur av sambýlum, herundir reglur um upptøku og gjalding. Hesar reglur eru ásettar í kunngerð nr. 2 frá 3. januar 2005 um skipan av sambýlum. § 4, stk. 1 í hesi kunngerð er soljóðandi:*

> ”**§ 4.** Búfólk rinda húsaleigu fyri uppihaldið. Harumframt rinda búfólk til felags útreiðslur. Gjaldið hjá einum búfólki kann tó ikki fara upp um ta upphædd, sum svarar til veruligu útreiðsluna fyri hvørt plássið í viðkomandi sambýli.”

Í Rundskrivi um skipan av sambýlum, dagfest 1. januar 2009, er millum annað ásett, at:

> “Persónar, ið búgva á sambýli, gjalda allar fastar útreiðslur, sum eru í sambandi við uppihaldið á sambýlinum, t.v.s. húsaleiga, el, hita, mat o.s.fr.
> Húsaleigan verður goldin av hvørjum húsfólki sær eftir teimum leigusáttmálum, sum húsfólkið ger við Nærverkið, tá flutt verður inn á sambýli.
> Tá húsfólk flytur inn á sambýli, verður ein avtala gjørd ímillum tað einkulta húsfólkið og leiðaran á sambýlinum um, hvat húsfólkið skal gjalda fyri í sambandi við uppihaldið á sambýlinum.”

*Tá umboðsmaðurin var á vitjan 1. mars 2012 vóru leigusáttmálar við búfólkini ikki undirskrivaðir. Hetta átalaði umboðsmaðurin, og í apríl 2012 hava øll búfólkini skrivað undir leigusáttmála millum Nærverkið sum útleigara, og búfólkið sum leigara. Umboðsmaðurin hevur fingið avrit av tveimum leigusáttmálum.*

Tað framgongur ikki av leigusáttmálunum, hvussu stór búvíddin er í fermetrum, men tá ið umboðsmaðurin var á vitjan, var staðfest, at kømur hjá búfólkunum vóru ymisk til støddar, eins og íbúðin sjálvsagt var tað størsta leigumálið í fermetrum. Øll búfólkini gjalda somu

leiguupphædd um mánaðin, sum ikki sæst verða ásett í mun til fermetrartalið ella nøkur onnur atlit.

***Eg havi heitt á Almannamálaráðið og Almannaverkið****, um at greiða mær frá, hvussu metingin av húsaleiguupphæddini er ásett, og hvørji atlit dentur verður lagdur á, tá ið metast skal um, hvussu stór upphæddin fyri húsaleigu skal verða um mánaðin.*

***Eg fari somuleiðis at heita á leiðaran*** *um at greiða mær frá, hvussu stórur partur av upphæddini (3.100 kr.), sum búfólkini gjalda fast um mánaðin, verður nýtt til mat hjá búfólkunum.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Smb. leiðaranum verður kostnaðurin til uppihalds í 2013 roknaður út frá tølum (nýtslu) í 2012, og har kr. 1400 eru til fastar útreiðslur sum olju, el, internet, bensin v.m. og 1700 kr. eru til mat.”

Við skrivi, dagfest 7. februar 2013, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> **”Viðvíkjandi viðmerkingum til fyribilsfrágreiðing av eftirlitsvitjan á sambýlunum á Traðarvegi og undir Fobbakletti í Sandavági. (viðmerkingar til viðmerking)**
>
> Ein villa er komin í viðmerkingarnar frá Almannaverkinum, tá skrivað verður: "Ongin beinleiðis húsaleiga verður goldin."
>
> Jú, allir íbúgvar gjalda eina eins húsaleigu áljóðandi kr. 2.500,- og sum fer beinleiðis á konto hjá Almannaverkinum, sum nevnist: "2150 Húsaleiga og íbúðargjald". Umframt hetta, er so gjald fyri fastar útreiðslur á sambýlunum.
>
> Viðvíkjandi ásetan av húsaleiguni, so er ein kunngerð: "Kunngerð nr. 2 frá 3. januar 2005, um skipan av sambýlum" §§ 4 og 5 og rundskriv um " skipan av sambýlum" ið snúgva seg um áseting av gjaldi brúkarans.
>
> Húsaleigan er nokk av fyrstan tíð ásett, tá sambýlini blivu umskipaði í 1988. Hugt hevur verið eftir, hvussu nógv búpláss hava verið, og so er ásett ein eins húsaleiga fyri øll búfólk, út frá einum rímiligheits sjónarmiði, og hvat búfólkið megnaði at gjalda. Hendan mannagongd er nokk blivin fylgd síðan, sjálvt um økið er vaksið munandi, bæði hvat viðvíkur tal av bústøðum, slag av bústøðum, vavi av bústøðum og hækkan av veitingum.
>
> Í samband við leiguhækkan í 2004, er grundskipanin ikki broytt, og leigan hækkar eins fyri øll búfólk. Í hesum sambandi skal gerast vart við, at kunngerð og rundskriv um húsaleigu, eru komin aftaná síðstu leiguhækkan.”

Við skrivi, dagfest 7. februar 2013, hevur Almannamálaráðið sent mær fylgjandi kunning:

> “**Viðv. áseting av húsaleigu til borgarar, ið búgva á sambýlum við Traðarvegi og undir Fobbakletti í Sandavági**
>
> ...

> Nú er svar komið frá Almannaverkinum, ið vísir, hvussu Almannaverkið ásetir húsaleigu smb. reglugerðum, ið gjørdar eru fyri húsaleiguásetingar v.m. á økinum um Sambýlir.
>
> Almannamálaráðið metir, at svarið frá Almannaverkinum er nøktandi, og at tað er í samsvari við ásetingarnar í "Rundskrivinum um skipan av sambýlum".
>
> ...”

*Eftir mínari metan er tað ikki nøktandi, at tað ikki eru greiðar mannagongdir fyri, hvussu metingar av húsaleiguupphæddini verða gjørdar.*

***Eg fari at mæla Almannamálaráðnum til****, saman við Almannaverkinum at gera eina neyvari mannagongd fyri, hvussu upphæddin av húsaleiguni skal metast, herundir hvørji atlit dentur skal leggjast á í sambandi við metingina av húsaleiguni.*

## 8. Eftirlit

Almannaverkið hevur eftirlit við sambýlunum á Traðarvegi og undir Fobbakletti, sambært § 9, stk. 1 í kunngerð nr. 2 frá 3. januar 2005 um skipan av sambýlum, meðan landsstýrismaðurin hevur yvirskipaða eftirlitið við sambýlunum, sambært § 9, stk. 2 í somu kunngerð.

Leiðarin greiddi umboðsmanninum frá, at tvey heilsufaklig eftirlit hava verið í sambýlunum ávikavist 2007 og 2009.

Harumframt hevur umboðsmaðurin fingið upplýst, at tað í august 2012 hevur verið námsfrøðiligt eftirlit í sambýlunum.

***Eg havi heitt á leiðaran og Almannaverkið** um at senda umboðsmanninum avrit av námsfrøðiligu eftirlitsfrágreiðingini, tá ið hon fyriliggur.*

Umboðsmaðurin hevur tann 5. desember 2012 fingið avrit av námsfrøðiligu eftirlitsfrágreiðingini.

Umboðsmaðurin hevur fingið avrit av roknskapum fyri felagsrakstur og fíggjarstøðu fyri 2009 og 2010 hjá sambýlunum. Tað framgongur av roknskapunum, at teir eru grannskoðaðir ávikavist 19. februar 2011 (roknskaparárið 2009) og 17. august 2012 (roknskaparárið 2010).

*Sum nevnt omanfyri er skipanin við uttanhýsis grannskoðan av roknskapi eitt nøktandi fíggjarligt eftirlit, og eg havi tí ikki viðmerkingar hesum viðvíkjandi.*

*Tó havi eg gjørt vart við, **at eg ikki haldi, at tað er nøktandi**, at tað gongur upp í hálvtannað ár, áðrenn roknskapir verða grannskoðaðir. Vanliga eiga roknskapir hjá almennum stovnum at verða gjørdir og grannskoðaðir hálvt ár eftir, at roknskaparárið endar, og í seinasta lagi 10 mánaðar eftir, at roknskaparárið er endað.*

***Eg havi heitt á leiðaran og Almannaverkið** um at fáa mannagongdir fyri, nær roknskapir í seinasta lagi skulu verða grannskoðaðir.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Almannaverkið vil skipa soleiðis fyri, at øll skjøl, uppgerðir v.m. verða latin tí, sum skal grannskoða, so skjótt sum møguligt, tá kalendaraárið er liðugt. Mannagongdir fyri hesum virksemi verða nú gjørdar.”

Tað sæst ikki av skjølunum í málinum, at annað eftirlit er við stovninum.

Tað sæst eiheldur av skjølunum í málinum, at Almannaverkið ella Almannamálaráðið hevur gjørt mannagongdir um, hvussu eftirlitið hjá Almannaverkinum og Almannamálaráðnum av sambýlum skal skipast.

*Eg haldi tað ikki vera nøktandi, at ongar mannagongdir eru fyri, hvussu Almannaverkið og Almannamálaráðið útinnir sína eftirlituppgávu við sambýlunum, herundir eisini uppfylging av eitt nú heilsufrøðiligum- og námsfrøðiligum eftirlitum. Eftir mínari meting eigur Almannaverkið at hava eitt neyvt eftirlit við sambýlunum sum heild, tað vil siga, at hoyringsreglur verða hildnar í sambandi við upptøku av búfólkum til sambýlini, eftirlit við bæði námsfrøðiliga støðinum og innihaldinum í sambýlunum, eitt heilsufakligt eftirlit, eftirlit við fíggjarviðurskiftunum, við fysisku umstøðunum í sambýlunum og umsitingina í sambýlunum annars. Víst verður til mínar viðmerkingar hesum viðvíkjandi omanfyri í frágreiðingini.*

***Eg havi tí spurt Almannaverkið og Almannamálaráðið,*** *hvørjar ætlanir eru um at betra um eftirlitið við sambýlunum og lata meg frætta aftur.*

***Eg havi eisini mælt Almannamálaráðnum saman við Almannaverkinum*** *til at gera mannagongdir fyri, hvussu myndugleikarnir skulu útinna sína eftirlitsskyldu við sambýlum.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Almannaverkið er samt við Umboðsmannin, at tað er ikki nøktandi, at ongar mannagongdir eru fyri, hvussu Almannaverkið og Almannamálaráðið útinna sínar eftirlitsuppgávur við sambýlunum, herundir eisini uppfylging av eitt nú heilsufrøðiligum og námsfrøðiligum eftirlitum. Almannaverkið fer at heita á Almannamálaráðið um at seta ein arbeiðsbólk fyri at orða hesar leiðreglur.”

Við skrivi, dagfest 7. januar 2013, hevur Almannamálaráðið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Í sambandi við viðmerkingarnar um ábyrgd af eftirliti av stovnunum undir Almannaverkinum skal Almannamálaráðið boða Løgtingsins umboðsmanni frá, at Almannamálaráðið í næstum fer, saman við Almannaverkinum, at taka neyðug stig til at fáa hesi viðurskifti skipað. Í sambandi við eftirlit av tí námsfrøðiliga partinum av viðmerkingunum hjá Almannaverkinum skal Almannamálaráðið boða Løgtingsins umboðsmanni frá, at Almannamálaráðið fer at venda sær til Almannaverkið við málinum fyri at tryggja, at hesi viðurskifti koma í rætt lag.
>
> Um heilsufakliga eftirlitið av sambýlunum skal Almannamálaráðið vísa á, at heilsufakliga eftirlitið formliga liggur hjá Landslæknanum, sum saman við umboðum frá Sundhedsstyrelsen skipa eftirlitið.”

## 9. Rundtúrur

### 9.1. Generelt um húsini og íbúðina á Traðarvegi

Generelt kann sigast, at húsini eru í rímiliga góðum standi. Ymsar ábøtur eiga tó at verða gjørdar. Hetta verður lýst niðanfyri.

Fýra búfólk búgva í hvør sínum kamari. Búfólkini eiga innbúgvið í teirra egna kamari, meðan stovnurin eigur innbúgvið í felagsøkjunum.

Húsini hava brandávaring men ikki tjóðaríávaring.

*Samanumtikið kann sigast, at húsini eru rímiliga væl egnað sum sambýli. Tó eru ikki umstøður til fólk, sum brúka koyristól. Húsini bera brá av, at tey ikki eru bygd til at vera sambýli fyri fýra einstaklingar.*

### 9.2. Loftið

Á loftinum er eitt stórt baðirúm og eitt minni vesi. Harumframt eru tvey smá kømur og eitt stórt kamar við atgongd til altan. Altanhurðin er ring at fáa upp.

***Eg havi heitt á leiðsluna*** *um at umvæla lásið fyri at tryggja útgongdina til altanina.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Smb. leiðaranum er lásið á altanhurðin umvælt.”

Brunaumsjónin hevur ikki sýnað húsini, men leiðarin upplýsti, at ein brandmaður hevur verið og hugt eftir teimum og hevði einki at finnast at.

***Eg havi heitt á leiðsluna*** *um at fáa húsini sýnað av Brunaumsjónini skjótast gjørligt.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Smb. leiðaranum fer hann í næstum at boðsenda Brunaumsjón landsins”.

### 9.3. Miðhæddin

Í miðhæddini er felagskøkur við døgurðaborði, og stova við atgongd til altan. Harumframt er skrivstovan hjá starvsfólkum, sum búfólk eisini hava atgongd til. Skrivstovan verður stongd, um starvsfólk ikki eru til staðar.

Í miðhæddini er eitt kamar og eitt baðirúm við vesi.

### 9.4. Kjallarin

Leiðarin greiddi umboðsmanninum frá, at búfólk og starvsfólk hava sjálvi innrættað kjallaran.

Kjallarin er innrættaður við einum stórum uppihaldsrúmi, har eitt klaver stendur. Uppihaldsrúmið verður eisini brúkt sum fundarhøli hjá starvsfólkunum.

Harumframt er eitt venjingarrúm við kondisúkklu, crosstrainara, rógvimaskinu o.a. Búfólkini á Traðarvegi, eins og tey undir Fobbakletti og í sambýlinum í Sørvági hava atgongd til venjingarhølið.

Eitt roykirúm er innrættað við útsúgving og góðum møguleikum fyri at lata upp vindeyguni í sambandi við útlufting.

Harumframt er eitt fýrrúm, har ymisk arbeiðsamboð verða goymd, eins og eitt goymslurúm til matvørur o.a. er í kjallaranum.

Læst starvsfólkavesi er í kjallaranum. Bert starvsfólk hava atgongd til starvfólkavesið.

Tvær úthurðar eru við knarva. Brandhurð er millum trappuna og miðhæddina í húsinum, eins og roykávaringar eru settir upp.

### 9.5. Íbúðin á Traðarvegi 34

Íbúðin, sum liggur saman við sambýlinum Traðarvegur 34, fevnir um kamar, baðirúm við brúsu umframt stovu og køk í einum. Harumframt er vaskikjallari og felags innan- og uttanduraøki við í leigusáttmálanum.

Undir eftirlitsvitjanini varð upplýst, at ein leki er í hesum húsinum.

***Eg havi heitt á leiðsluna** um sum skjótast at fáa umvælt lekan.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> ”Viðv. lekanum á Traðarvegi so skal hann fráboðast Landsverk, sum umsitur umvælingar, og tað ætlar leiðarin at gera sum skjótast.”

### 9.6. Generelt um húsini undir Fobbakletti

Í sambandi við eftirlitsvitjanina fekk umboðsmaðurin avrit av eini frágreiðing, dagfest 6. februar 2012, sum er gjørd av HMP Consult, Tórshavn. Frágreiðingin er viðvíkjandi soppakanning av kjallaranum á ognini undir Fobbakletti.

Umboðsmaðurin sendi við skrivi, dagfest 5. mars 2012, soljóðandi skriv til Almannaverkið:

> **“Viðvíkjandi vitjan í sambýlunum á Traðarvegi og undir Fobbakletti**
>
> Umboðsmaðurin hevur tann 1. mars 2012 verið á eftirlitsvitjan í sambýlunum á Traðarvegi og undir Fobbakletti í Sandavági.
>
> Í sambandi við hesa vitjan varð upplýst fyri umboðsmanninum, at sambýlið undir Fobbakletti er undir umbygging grundað á ymiskar skaðar, herundir lekar/vatnskaðar og positivum úrsliti av kanningum av soppa í kjallaranum, sum eru staðfestir á ognini.

> Á vitjanini inni í húsinum undir Fobbakletti kundi staðfestast, at ein sera ringur luktur var í øllum húsinum og serliga á loftinum, har tvey búfólk hava kømur. Lukturin er íkomin av tí, at rot er í einum veggi í baðirúminum, sum liggur millum hesi bæði kømrini. Umboðsmaðurin fekk upplýst, at annað av búfólkunum, sum hevði kamar á loftinum, í løtini hevur fingið kamar í kjallaranum í húsinum.
>
> Í løtini eru einans tvey búfólk í húsinum, umframt tvey starvfólk. Eitt búfólk, sum vanliga býr í húsinum, er í løtuni innlagdur á Psykiatriska deplinum, og arbeitt verður við at fáa tvey búfólk afturat teimum trimum búfólkunum.
>
> Eg haldi ikki, at húsini í løtini eru egnað til bústovn, nú tey eru undir umbygging og umvæling. Eg fari tí at heita á Almannastovuna um at finna onnur hóskandi høli til búfólk og starvsfólk, so leingi húsini undir Fobbakletti eru undir umbygging/umvæling.
>
> Eisini fari eg at biðja Almannastovuna um at kunna meg um, hvat víðari hendir í hesum máli.
>
> Avrit av hesum brævi er sent til Nærverkið og Almannamálaráðið."

Við skrivi, dagfest 21. mars 2012, boðaði Almannastovan umboðsmanninum frá, at búfólkini undir Fobbakletti vóru flutt í leigað hús á Steigartúni 5 í Sandavági. Sambært leiðaranum í sambýlunum var hetta ein góð loysn, og boðað varð samstundis frá, at búfólkini ikki fluttu inn aftur í ognina undir Fobbakletti, fyrr enn umvælingin er liðug. Almannamálaráðið fekk somu kunning sum umboðsmaðurin.

Seinni var umboðsmaðurin telefonisk kunnaður um, at búfólkini, sum fyrst vóru flutt í leigað hús á Steigartúni 5 í Sandavági, vóru flutt til leigað hús í Sørvági.

***Eg havi biðið Almannaverkið** um at kunna meg um, hvat víðari er hent í hesum máli.*

Við skrivi, dagfest 14. desember 2012, hevur Almannaverkið sent mær fylgjandi kunning:

> "Landsverk skal gera eitt tilmæli um, hvat skal gerast og eina meting av kostnaðinum. Tilmælið er enn ikki komið, so Almannaverkið húsast enn á Mýritrøðni 12 í Sørvági."

## 10. Samrøður við búfólk

Í sambandi við eftirlitsvitjanina varð eitt uppslag sett upp í sambýlunum, har kunnað varð um eftirlitsvitjanina. Tey búfólkini, sum høvdu hug til tess, fingu tilboð um at fáa eina samrøðu við umboðsmannin um viðurskiftini á stovninum ella um teirra privatu viðurskifti.

Eitt búfólk ynskti at fáa orðið á umboðsmannin. Á hesum fundinum var einki ítøkiligt ynski um broytingar viðvíkjandi viðurskiftum á stovninum sett fram. Búfólkið greiddi umboðsmanninum frá, at tað var væl nøgt við at búgva í sambýlinum.

Umboðsmaðurin kunnaði leiðsluna í Almannaverkinum og leiðaran av sambýlunum um samrøðuna á endaliga fundinum sama dagin.

Sólja í Ólavsstovu
umboðsmaður